# Leiðari til kalvaalingina hjá P/F Fiskaaling

Av tí at leiðarin fyri kalvaalingina er farin í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv leyst at søkja á P/F Fiskaaling.

Viðkomandi, ið settur verður, kemur at hava dagligu ábyrgdina av at menna kalvaalingina í felagnum, og skal skipa og leggja hetta til rættis soleiðis at arbeiðið verður framt undir tryggum og skipaðum umstøðum.

Í sambandi við at felagið nú er farið undir eina verkætlan sum hevur sum endamál at menna kalvaaling í Føroyum byggir felagið í løtuni eina støð til hetta endamál. Men hóast henda støð í fyrstu atløgu er ætlað til kalva verða her eisini skaptir møguleikar fyri at fara undir menning av øðrum fiska- og djórasløgum. Tann, ið settur verður í starv, fær tí eisini, saman við stjóra felagsins, ábyrgdina av at menna aling av øðrum fiska- og djórasløgum sum felagið møguliga fer undir komandi árini.

Tann, ið settur verður, kemur at arbeiða í einum mennandi arbeiðsumhvørvi saman við góðum starvsfeløgum og fær møguleikar at menna seg víðari, við at luttaka á ymsum skeiðum uttanlanda.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum, at tann sum settur verður, hevur útbúgving frá hægri lærustovni og hevur holla viðkomandi vitan, sum ger hann vælskikkaðan til starv av hesum slag. Umsøkjarar, sum umframt at hava hollan ástøðiligan kunnleika, eisini hava praktiskar royndir innan alivinnuna, hava fyrimun.

Hevur tú hug til stórar avbjóðingar, eitt ábyrgdarfult, viðkomandi og mennandi starv innan føroysku alivinnuna, kunnu vit bjoða tær alt hetta, umframt góðar arbeiðsumstøður og møguleika at menna teg víðari.

Ynskiligt er at starvið verður sett skjótast gjørligt, men hinvegin hava vit eisini tíð at bíða eftir rætta viðkomandi, um so er at umstøður gera, at viðkomandi ikki er tøkur beinanvegin. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu, í mun til útbúgving og starvsroyndir.

Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum, skulu sendast P/F Fiskaaling, Við Áir, FO 430 Hvalvík, í seinasta lagi 1. juli 2000. Vilja tygum hava nærri upplýsingar um starvið, kunnu tygum seta tygum í samband við P/F Fiskaaling, Símun Joensen, stjóra, telefon 474747 ella 214747.

Við Áir 13.6.2000

**P/F Fiskaaling**

### Lýsing av P/f Fiskaaling

P/F Fiskaaling er partafelag, har Føroya Landsstýri eigur allan partapeningin. Felagnum er álagt at standa fyri tí føroyska kynbótaarbeiðnum við laksi og sílum. Endamálið við kynbótaarbeiðnum, er at ala fram ein frískan fisk, sum hevur best møguligar eginleikar, soleiðis at føroyska alivinnan er betur kappingarfør á altjóða marknaðinum. Kynbótaarbeiðið byrjaði í 1991 og er seinastu árini ment, soleiðis at í dag verður valt út fyri allar eginleikar, sum til ber at hava við í kynbótaarbeiði við laksi. Fyrstu 5 árini hava 150 familjur verið tiknar við í kynbótaarbeiðnum, men frá 1999 at rokna er støðin víðari útbygd, soleiðis at til ber at hava 400 familjur við í úrvalinum. Eftir seinastu útbyggingina er føroyska kynbótaarbeiðið fult á hædd við kynbótaarbeiðið, sum verður gjørt í øðrum londum. Umframt at standa fyri kynbótaarbeiðnum er felagnum eisini álagt at menna nýggj fiskasløg til føroysku alivinnuna. Í hesum sambandi hevur felagið seinastu árini arbeitt við eini verkætlan innan aling av toski. Hendan er nú steðgað og felagið er farið í holt við eina verkætlan, sum hevur til endamáls at menna alingina av kalva. Sum liður í kynbótaarbeiðnum framleiðir felagið hartil 2000-3000 litur av laksarognum árliga umframt nakað av sílarognum. Samlaði umsetningurin í felagnum seinastu árini hevur verið umleið 25 mill. kr.

# Avloysari

**Ellis- og Umlættingarheimið søkir avloysara fyri hjálparfólk í farloyvi í tíðarskeiðinum 1. oktober 2000 til 30. september 2002.**

**Starvið**
Arbeiðið umfatar røkt og umsorgan av búfólkunum og reingerð av stovninum. Arbeiðstíðin er 0,75 tíð og er skipað í vaktum.

**Setunarviðurskifti**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Tórshavnar kommunala starvs- og tænastumannafelag og Tórshavnar kommunu.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Sólgerð Djurhuus, leiðara, tlf. 311839, ella Hanne-mi á Brúgv, deildarsjúkrasystur, tlf. 315522.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsing um útbúgving og royndir skulu verða Ellis- og Umlættingarheiminum, V. U. Hammershaimbsgøta 7, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 26. juni 2000. Merk umsóknina "Avloysari".

Tórshavnar kommuna

## LÆRARAR skúlaárið 2000/2001

Søkt verður eftir lærarum fyri skúlaárið 2000/2001.

1 fulltíðarstarv
1 sjúkravikar 15 tímar
1 starv 20 tímar frá 21. august til 19. november

Talan er um vanligar lærugreinir í 1.–10. fl. Tó hava lærarar, sum kunnu undirvísa í týskum, fyrimun.

Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært galdandi avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4

Umsóknir til størvini skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 20. juni 2000.

**Skúlanevndin í Nes Kommunu**
v/ Elin Ó. á Torkilsheyggi
655 Nes



## Familjulega

Frá 30. juli til 3. august verður familjulega í Nesvík. Seinasta freist at tekna seg er 15. juli hjá Jákubinu Hansson, tlf. 310430.

## TILBOÐ ÚT AV HÚSINUM

**EM-búffur**
*v/ bakaðum epli og tilhoyri*

Einans 98,-

MARCO POLO
*Sverrisgøta 12 • 100 Tórshavn*
*Tel. 313430 • Fax 313220*
*www.marcopolo.fo*

Sosialurin - 311820

## Vágs Skúli

Søkt verður eftir 2 lærarum skúlaárið 2000/2001. Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir við ljósriti av próvskjølum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 03. juli 2000.

**Vágs skúlanevnd**
900 Vágur

## Royndarfiskiskapur

Í 2000 er peningur tøkur til hesar fiskiroyndir:
1) Línuroyndir á Reykjanesrygginum
2) Royndir á landleiðini við trolbustum

Reiðarí, sum kundu hugsað sær at luttikið í nevndu royndum, kunnu frætta nærri við at venda sær skjótast tilber til

**Fiskirannsóknarstovuna**
Nóatún, Postrúm 3051
FO-110 Tórshavn
Tlf. 315092, Fax 318264

## Vit gera alt URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78



# HANDILS LÆRLINGUR til Griffilin

**Til handil okkara, ið selur alla skrivstovuútgerð og ymiskt annað, verður søkt verður eftir røskum, fyrikomandi lærlingi, sum dámar at hava nógv at gera...**



**Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so kom inn og tosa við Kára Justinussen.**

griffilin
SMS • TEL 31 08 40

# Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Lærari at undirvísa deyvum børnum

**Starvið**
Lýst verður eftir lærara at undirvísa deyvum børnum frá 1. august 2000.

**Høvuðsuppgávan er:**
- At undirvísa deyvum næmingum.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjari hevur:
- Útbúgving sum lærari.
- Førleika at undirvísa í og á teknmáli.
- Góð samstarvsevni.
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt.

**Setanar- og lønartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skal verða send:

**Sernámsdeplinum**
á Frælsinum 32
Postrúm 2036
165 Argir

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 3. juli 2000.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú seta teg í samband við Maritu Petersen í Sernámsdeplinum, tlf. 314522.

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt hevur stýrið uppgávur, ið viðvíkja kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Í **Sernámsdepilinum** er: Skúlapsykologisk- og sernámsfrøðilig ráðgeving fyri alt skúlaverkið, skúli við næmingaheimi, smábarnadeild við eygleiðing og talibólkum, talideild, hoyritólamiðstøð og hugskots- og leikasavn.

# Kunngerð

**Til ánarar av bingjum í Tórshavnar kommunu.**

Bingjur, ið standa á sama stað meira enn 6 mánaðir, koma undir ásetingar í byggisamtyktini.

Tey, sum varða av bingjum, ið standa á privatum ella almennum øki í Tórshavnar kommunu, verða vinarliga biðin um at seta seg í samband við Teknisku deild hjá kommununi á tlf. nr. 315160 beinanveg.

*Tórshavnar kommuna*

# Dugir tú at servera?

**Til matstovu okkara verður søkt eftir servitrisu / tænari at byrja beinanvegin.**

Arbeiðstíð og løn eftir nærri avtalu.

Vit bjóða tær eitt gott arbeiðspláss og góðar samstarvsfelagar í einum nógv vitjaðum umhvørvi.

Hevur hetta tín áhuga, vinarliga ring 21 96 96 ella 31 97 67.

RIO BRAVO
Tel 319767
RESTAURANT

*RIO BRAVO • Tórsgøta 11 • Tórshavn*

## Tjaldurs Apotek

Søkt verður eftir 4 farmakonomnæmingum, at byrja 21. august 2000.

Ert tú áhugað/ur at nema tær útbúgving innan apotek, kunnu vit bjóða tær eina spennandi og áhugaverda útbúgving.

Farmakonomútbúgvingin umfatar í stuttum:
- Læra at arbeiða við heilivági, framleiða heilivág, læra um hvørji evni eru í, og hvussu heilivágur virkar og skal handfarast.
- Læra at arbeiða saman við nógvum starvsfólki, at arbeiða sjálvstøðugt og taka avgerðir sambært givnum lógum.
- Læra at geva kundum okkara góða tænastu og leiðbeining í samband við útflýggjan av apotekaravørum.

Útbúgvingin tekur 3 ár og fer fram á Tjaldurs apoteki í Tórshavn, í samstarvi við Farmakonomskúlan í Hillerød, har næmingurin skal í skúla frá 1-4 vikur ísenn, íalt 7 ferðir í lærutíðini. Aftaná 2 ár, og tá lærutíðin endar er próvtøka á skúlanum.

Krøv til umsøkjaran: Students/HF prógv, HH ella HT.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, verður at senda til

**TJALDURS APOTEKIÐ**
Postboks 3010 • 110 Tórshavn

áðrenn 10. juli 2000.

## Fólk søkist

Fryntligt, fyrikomandi og kvikt fólk søkist at servera í Nantong, skjótast møguligt.

Nantong

**Tlf. 218668**

## Randarhús Millum Gilja

Um hóskandi boð fæst verða eini randarhús Millum Gilja lýst til sølu. Húsini eru bygd í 1988/89, hava krúpikjallara, 2 hæddir og loft.

Stovuhæddin er 69 m², miðhæddin er 59 m², og loftið er 30 m². Grundøkið er 232 m² til støddar. Gjørt er framman og aftanfyri húsini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til

**Advokatskrivstovuna**
**Fr. Petersensgøta 9**
Att: Fríða Patursson, adv.

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

## Ólavsøkuframsýningin 2000

Listafelag Føroya skipar fyri Ólavsøkuframsýning í Listaskálanum. Øll kunnu senda inn verk til Ólavsøkuframsýningina.

Verkini skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. juli. Saman við verkunum skal vera listi yvir tøkni, heiti og prís, um verk eru til sølu, og øll verk skulu vera týðuliga merkt samsvarandi listanum.

Listafelagið setir eina nevnd at skipa fyri framsýningini, og tilskilar sær rætt til at taka dagar í, hvussu úrval og samanseting skulu vera.

Listaskálin er opin mánadag–fríggjdag
kl. 11–17, leygardag og sunnudag kl. 14–18.

**Listafelag Føroya**
Box 1141
110 Tórshavn · Tlf. 313579